VESTNORDENFONDEN
MENNINGARGRUNNUR ÚTNORÐURS



# ÁRSROKNSKAPUR 2015

***Innihaldsyvirlit*** — ***bls.***


| | |
|---|---|
| Nevndarfrágreiðing | 2 |
| Átekning leiðslunnar | 6 |
| Grannskoðanarátekning | 6 |
| Rakstrarroknskapur 2015 | 7 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2015 | 8 |
| Peningastreymsútgreining 2015 | 9 |
| Viðmerkingar | 10 |



**ISLAND**: SIGTÚN 42 I IS-105 I REYKJAVÍK • **POSTADRESSE**: POSTBOKS 8096 I IS-128 I REYKJAVÍK
**TELEFON**: +354 530 2100 • **WEB**: www.vestnorden.is • **E-MAIL**: vestnorden@vestnorden.is
**GRØNLAND**: AQQUSINERSUAQ 48A I POSTBOKS 798 I 3900 NUUK I **TELEFON**: +299 323 431

***Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs:***

Í 2015 hevur Menningargrunnur Útnorðurs goldið 25,5 MDKK út í nýggjum lánum. Í 2014 var upphæddin 17,670 MDKK.
Gjaldførið hjá Menningargrunni Útnorðurs ger tað møguligt, at árligu útlánini í meðal kunnu vera 20 MDKK. Grundað á lága búskaparliga virksemið í Grønlandi og Føroyum seinastu árini, hevur tað verið avmarkaður eftirspurningur eftir lánum frá Menningargrunni Útnorðurs. Økingin av útgoldnum lánum í 2015 í mun til 2014 skal sostatt síggjast sum eitt jaligt tekin.

Tann føroyski búskapurin er ógvuliga nógv tengdur at gongdini í fiskivinnuni, tað vil siga eins væl gongdini í atkomuligari veiðunøgd sum heimsmarknaðarprísunum.
Tann føroyski útflutningurin, tá ið skip ikki eru tald við, vaks í 2015 í mun til 2014 við 6,2%. Vøksturin stavar frá útflutningi av botnfiski(toski, hýsu og upsa) og uppisjóvarfiski, sum vuksu ávikavist 20,8% og 16,3%, meðan útflutningurin av alifiski minkaði við 5,5%. Tað er framvegis uppisjóvarfiskur, alilaksur og botnfiskasløgini, sum er tann størsti parturin av útflutninginum. Føroyar ásettu sær í fleiri ár egna makrelkvotu, og var hon munandi størri enn undanfarin ár. Síðani 2014 hava Føroyar gjørt avtalu við onnur strandalond um býtið av makrelfiskiskapinum. Føroyar hava sambart avtaluni 12,4% av teirri samlaðu avtalaðu veiðinøgdini av makreli í Norðuratlantshavi. Luturin er óbroyttur í mun til árið fyri. Alivinnan hevur somuleiðis seinnu árini havt ein vøkstur. Útflutningsvirðið av alilaksi var í 2015 41% av samlaða útflutningsvirðinum hjá Føroyum. Prísgongdin fyri botnfisk var í 2015 uppgangandi.
Innflutningurin, skip undantikin, vaks við 0,3% í 2015. Í 2014 var talan um eitt fall upp á 5,5%. Hóast talan er um ein vøkstur í innflutninginum, er framvegis talan um ein stíg í innlendska eftirspurninginum.
Arbeiðsloysið í 2015 fall í mun til 2014. Talið av fulltíðararbeiðsleysum var í oktober 2015 677 persónar móti 898 persónum í november í fjør. Við ársenda 2015 var arbeiðsloysisprosentið 2,3% móti 3,1% í 2014.
Landskassin hevur eitt hall upp á 200 MDKK í 2015. Landskassin fíggjar hallið við at selja virðisbrøv. Um so verður, at altjóða rentustøðið hækkar, ella at føroyska kredittvirðið fellur, so kunnu øktar rentuútreiðslur avmarka møguleikarnar hjá samlaða búskapinum at fremja vøkstur í samfelagnum.

Grønlendski búskapurin hvílir í høvuðsheitum á einum árligum blokkstuðli úr Danmark og á at gagnnýta livandi tilfeingi, serliga rækjur. Blokkstuðulin var í 2015 3.679 MDKK og verður indeksreguleraður við prís- og lønargongdini í Danmark.
Seinnu árina hava rækjukvoturnar verið munandi skerdar. Góðir prísir á heimsmarknaðinum fyri rækjur og fallandi oljuprísir hava samstundis tryggjað eina góða búskaparliga gongd í rækjuvinnuni. Avmarkingarnar í rækjufiskiskapinum hava havt eina jaliga ávirkan á náttúrufrøðiligu støðuna hjá rækjustovninum. Tað hevur havt við sær, at náttúrufrøðiligu tilmælini eru hækkað, og eru tilmælini, at í mesta lagi verða fiskað 90.000 tons í 2016 í Vesturgrønlandi. Tað er ásett ein kvota upp á 85.000 tons, og tað er við atliti at, at tað komandi árini kann verða grundarlag fyri størri hækking av kvotunum. Góðu prísirnir á heimsmarknaðinum og lágu oljuprísirnir føra væntandi góða búskaparliga gongd hjá rækjuvinnuni við sær. Fyri onnur fiskasløg hevur tað eisini verið ein støðug og jalig gongd. Hetta fevnir tó ikki um makrelfiskiskapin, har bert ein avmarkaður partur av kvotuni varð fiskaður í 2015.
Byggi- og løguvirksemið er í 2015 økt í mun til árið fyri. Tað er serliga í Nuuk, at byggivirksemið er økt. Útlit eru fyri, at byggi- og løguarbeiðið í 2016 verður meiri enn í 2014.

Í ferðavinnuni hevur í fleiri ár ikki verið vøkstur. Tað er tó eydnast fleiri hotellum á fleiri ymiskum støðum at fáa jalig rakstrarúrslit. Menningargrunnur Útnorðurs metir, at hotellini, sum Grunnurin hevur fíggjað, eru inni í einari jaligari gongd. Grønlendska sjálvstýrið roynir við bøttum karmum fyri ferðavinnuna at fáa økt virksemi í ferðavinnuna, og harvið øktar inntøkur. Hesar ætlanir fevna eisini um at byggja nýggjar flogvøllir og at útbyggja teir verandi. Fígging skal útvegast til verkevnini, áðrenn tað sæst í løguvirksemi. Verða ætlanirnar gjøgnumførdar, fer tað at betra um møguleikarnar fyri at fáa fleiri ferðafólk til landið, og til ta tíð fer tað so at hava við sær tørv á at víðka um hotellkapacitetin og gera íløgur í ferðavinnukervið.
Teir nógv fallandi oljuprísirnir síðani 2014 hava havt neiliga ávirkan á áhugan hjá oljufeløgunum at leita eftir olju. Tí eru ongar ætlaðar oljuboringar í 2016.
Innan námsvinnuna er eitt nám byrjað í 2014, og ætlanin er at byrja rakstur har í 2016. Talan er um eina minni námsfyritøku, sum serliga hevur týdning fyri búskapin í nærumhvørvinum; men námið er ikki av einari støðd, sum fer at ávirka samlaða grønlendska búskapin munandi.
Heimsmarknaðarprísirnir á jarni og øðrum mineralum hava seinnu árini verið fallandi. Tí eru ætlanirnar frá undanfarnum árum at byrja eitt størri jarnnám ikki vorðnar verunleiki. Somuleiðis eru ætlanir um at byggja eina alminiumsbræðiverksmiðju settar í bíðistøðu.

Miðvísa arbeiðið hjá grønlendska sjálvstýrinum at skapa áhuga fyri at leita eftir og útvinna olju og mineralsk evnir hevur soleiðis higartil verið eitt vónbrot. Tað hevur tó týdning, at hildið verður fram at spjaða vitan um ráevnir í Grønlandi, soleiðis at man, tá ið tað einaferð í framtíðini verður øktur eftirspurningur eftir olju og málmi, kann tryggja leitivirksemið í Grønlandi og byrja at útvinna ráevnir.

Í Grønlandi hevur Menningargrunnur Útnorðurs í 2015 fíggjað tvey verkevni við tveimum lánum fyri tilsamans 10 MDKK. Eitt lán upp á 4 MDKK er útgoldið til eitt verkstað,og eitt lán upp á 6 MDKK er útgoldið til eitt trolverkstað.

Í Føroyum hevur Menningargrunnur Útnorðurs fíggjað trý verkevni við trimu lánum fyri tilsamans 15,5 MDKK. Tað eru útgoldin tvey lán fyri í alt 12,5 MDKK innan hotell og ferðavinnu. Eitt lán upp á 3 MDKK er útgoldið til fyritøku innan ídnað.

Rentuinntøkurnar hjá Menningargrunni Útnorðurs fullu í 2015 til 2,877 MDKK(2,932 MDKK í 2014). Samlaði rakstrarkostnaðurin til fyrisiting er 2,823 MDKK (3,157 árið 2014).
Sum burturleggingar til tap av útlánum og útreiðslur til veð vórðu útreiðsluførdar 0,578 MDKK, meðan tað í 2014 vórðu inntøkuførdar 0,279. Úrslitið frá rakstri, áðrenn burturleggingar, var eitt avlop upp á 0,111 MDKK, móti einum halli upp á 0,168 MDKK í 2014. Úrslitið áðrenn burturleggingar var sostatt 0,279 MDKK betri enn í 2014. Úrslitið frá rakstri gjørdist eitt hall upp á 466.578 DKK móti einum avlopi upp á 111.503 DKK í 2014.

Nevndin er av teirri fatan, at tað er ikki nøktandi, at tað ikki hevur verið møguligt at økja um rentuinntøkurnar. Rentuinntøkurnar eru ávirkaðar av tí generella lága rentustøðinum og teimum samlaðu útlánunum. Rentuinntøkurnar eru variablar í samband við interbankrentuna CIBOR, tó soleiðis, at lán, veitt seinnu árini, hava eina minsturentu. Rentuinntøkurnar frá gjaldførinum eru eisini variablar, og eru tengdar at, hvørja rentu man kann fáa á innlánskonto í peningastovni. Í 2014 hevur rentan av peningi innistandandi í peningastovni verið minni enn 0,5% p.a.
Nevndin staðfestir við nøgdsemi, at tað hevur verið eitt fall í rakstrarútreiðslunum. Hetta skyldast serliga, at Grunnurin er fluttur í onnur hølir, og harvið hevur klárað at spart í húsaleiguútreiðslum. Eisini eru sparingar framdar til gerð av ársroknskapinum, sum ikki longur verður prentaður og sendur runt í papírsformi, men bert elektroniskt.
Nevndin heldur, at tað er nøktandi, at tað hevur verið ein hækkan í útlánum samanborið við undanfarna ár. Tað er eisini jaligt, at verandi lán eru av slíkari støðd, at tað ikki hevur verið neyðugt at økt burturleggingar procentvís fyri at standa ímóti tapi.
Sæð undir einum, metir nevndin, at úrslitið fyri 2015, sæð í ljósinum av lága rentustøðinum og samfelagsbúskaparligu viðurskiftunum í Grønlandi og Føroyum, er nøktandi.

***Skrivstovur og starvsfólk***:
Menningargunnur Útnorðurs hevur skrivstovu í Reykjavík og Nuuk. Virksemið í Føroyum verður røkt úr Nuuk. Menningargrunnur Útnorðurs hevur tvey starvsfólk, tað sama sum undanfarin ár.

## ÚTGOLDIN LÁN

***Tvey lán vórðu útgoldin til grønlendsk verkevni:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tankeeraq Aps. | • oljuflutningur/verkstaður | 4.000.000 DKK | 15 ár |
| Qalut Vónin | • trolverkstaður | 6.000.000 DKK | 12 ár |

***Trý lán vórðu útgoldin til verkevni í Føroyum:***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Gunnar Skúvadal | • ferðavinna | 3.500.000 DKK | 15 ár |
| Hotell Hafnia | • hotell | 9.000.000 DKK | 15 ár |
| Looknorth | • ídnaður | 3.000.000 DKK | 7 ár |

Útgoldin lán tilsamans til verkevni í útnorðri 25.500.000 DKK

## ÁVIRKAN AV LÀNVEITAN

Útlán Menningargrunn Útnorðurs í 2015 til Grønlands eru játtað til verandi fyritøkur. Tann eina fyritøkan hevur savnað sítt virksemi í nýggjum hølum. Tað skuldi givið ein samlaðan betri rakstur. Hin fyritøkan hevur bygt nýggjan og tíðarhóskandi bygning til sítt virksemi. Hesar fyritøkur hava samanlagt 75 ársverk.
Útlánini hjá Menningargrunni Úrnorðurs í Føroyum í 2015 vóru somuleiðis til verandi fyritøkur. Tey fýra av fimm lánum til grønlendskar fyritøkur vóru til verandi fyritøkur. Hesar fyritøkur hava samanlagt 75 ársverk. Ein av fyritøkunum hevur gjørt íløgur í nýggja útgerð fyri at betra um kappingarførið. Ein onnur fyritøka hevur gjørt íløgur fyri at økja um kapacitetin og betra um kappingarførið. Tann triðja fyritøkan hevur gjørt íløgur, soleiðis at fyritøkan fær breiðkað sítt virkisgrundarlag.

## ÚTLIT

Búskapargongdin í teimum evropeisku londunum hevur í fleiri ár verið ávirkað neiliga av fíggjarkreppuni í fleiri londum. Sjávt um tað eru funnar fyribilsloysnir á skuldartrupulleikunum, so er tað framvegis ein trupulleiki, at vøksturin í flestu av londunum er ov lágur. Ein betring av vøkstrinum í USA hevur ikki kunnað drigið vøksturin í Evropa uppeftir. Samstundis er vøksturin í Kina vorðin minni enn undanfarin ár, og tað ávirkar onnur lond neiliga.

Rentustøðið á heimsmarknaðinum, og ikki minst í Danmark, hevur verið lágt í 2015, og tað eru ikki útlit til, at hettar broytist munandi í 2016.

Fallið á oljuprísunum á heimsmarknaðinum í 2014 helt fram í 2015. Hetta kann beinleiðis fáa eina jaliga ávirkan á búskaparvirksemið, tá ið framleiðslukostnaðirnir lækka. Samstundis týða lægri oljuprísir, at tað verður truplari at fáa lønandi oljuframleiðslu, og harvið minka løgurnar i oljuleiting og møguligari gagnnýtslu av oljuútvinnan. Tað er í fyrsta umfari, at tað merkist í londum sum Grønlandi, har kostnaðurin til at leita eftir og útvinna olju er munandi hægri enn nógva aðrastaðni.

Gongdin í rávøruprísunum á jarni og øðrum mineralskum vørum hevur eisini verið lág. Tað hevur, eins og tað hevur havt við sær, at tað at leita eftir og útvinna olju, í fyrstu syftu hevur neiligan týdning fyri lond sum Grønland. Altjóða feløgini á olju- og mineraløkinum hava verið afturhaldandi við at byrja nýtt leitivirksemi í Grønlandi.
Nevndin væntar sostatt ikki, at olju- og mineralleitan vil fáa avgerandi týdning fyri búskaparliga virksemið í Grønlandi og í 2016. Tí vilja tær lokalu fyritøkurnar ikki fáa arbeiðsuppgávur við veiting til tey feløg, sum taka sær av at leita eftir og møguligari seinni útvinnan.

Tað hevur verið framgongd í føroyska búskapinum. Fólkatalið veksur, og tað vera gjørdar stórar almennar íløgur. Tað er framvegis ein stór avbjóðing at skapa eitt samfelag, har ung vælútbúgvin fólk ynskja at flyta til. Nógv hava útbúgving og royndir, sum verandi vinnulív ikki hevur nógva vitan um, og fleiri mugu vera opin fyri, at tey mugu skapa sítt egna starv. Tí er tað ómetaliga týðandi við fíggingarkeldum, sum hava til endamáls at stuðla undir eitt ríkt og fjøltáttað vinnulív. Politiska málið um eitt økt fjølbroytni í búskapinum, og fleiri íverksetarar treyta atgongd til fígging. Í Føroyum er stórur vøkstur í ferðavinnuni, og tað er eitt stórt fokus at menna vørur og tænastur til ferðafólk, kreativan ídnað v.m. Við stóru verkætlanini Talgildar Føroyar hevur landsstýrið byrjað eina fimm ára ætlan fyri at byggja eitt talgilt kervi, sum talgildir stóran lut av almenna geiranum og privatum tænastum. Verkætlanin gevur stórar møguleikar, so KT – ídnaðurin kann mennast, og sum í dag er nógv minni í mun til í grannalondunum.

Við útlitum til lágt búskaparligt virksemi í Grønlandi væntar nevndin, at eftirspurningurin eftir útlánum til vinnufyritøkur í Grønlandi verður avmarkaður í 2016. Í Føroyum má tað vísa seg, um tað økta virksemið førir til øktar íløgur, og harvið eisini nýggjar útlánsmøguleikar. Nevndin væntar, at afturgjaldsevnini hjá lántakarum hjá Menningargrunni Útnorðurs gjøgnumgangandi framhaldandi fara at verða góð, men nevndin er eisini fyrireikað til, at tað kunnu koma tap av einstøkum fyritøkum. Tí væntar nevndin, at tað í 2016 eins og undanfarna ár, skal nóg mikið leggjast burtur í roknskapinum til at standa ímóti tapum, sum roknast kann við í árinum ella seinni.

Nevndin væntar, at gjaldførið við árslok 2016 fer at verða á sama støði sum við árslok 2015. Útgjald av nýggjum útlánum væntast at svara til goldnar avdráttir av verandi lánum. Við væntaðum, samlaðum útlánum í 2016 svarandi til samlaðu útlánini í 2015, og við útlitum til eitt framhaldandi lágt rentustøði, væntar nevndin, at rentuinntøkurnar fara at kunna verða undir neiligari ávirkan í 2016. Gongin kann herðast, um fyritøkur halda uppat við sínum virksemi, og um einstøk lán verða afturgoldin fyri avtalaðu tíðina. Um so verður, at eftirspurningurin eftir nýggjum útlánum vísir seg at verða størri enn væntað, er nevndin sinnað at lata samlaðu útlánini økjast í mun til samlaðu útlánini í 2015. Samstundis skal atlit takast til, at einstøku lánini

hava neyðugu trygdirnar. Tað skal sostatt miðast ímóti, at samlaði tapsvandin á útlánum og staðfest tap, sum higartil verða hildin á einum støði, so tað ikki hevur við sær eina týðandi úttynnan av eginognini. Nevndin væntar soleiðis, at nýggj útlán kunnu játtast í tann mun, at lánini ikki hava ein tapsvanda við sær, sum fer upp um tapsvandan á líknandi verandi lánum.

Nevndin og dagliga leiðslan tryggja eina framhaldandi neyvari stýring av fyrisitingarkostnaðinum. Hesir væntast tí bert at hækka marginalt í 2016. Hækkingin er grundað á, at tað er munur á fundarkostnaðinum í mun til í hvørjum landi, nevndin velur at halda sínar fundir. Samlað væntar nevndin, at úrslitið áðrenn burturleggingar til at standa ímóti tapi, verður marginalt lægri í 2016 enn í 2015. Úrslitið verður ikki nóg mikið til at geva eitt nøktandi avkast av eginognini. Um so verður, at tað vísir seg møguligt at økja samlaðu útlánini í mun til 2015, kann hetta hava við sær, at tað skal meiri burturleggjast til at standa ímóti tapum. Tí kann tað upp á styttri sikt vísa seg, at úrslitið vísir hall. Øvut fer økt samlað útlán í komandi árum at vísa seg við størri framtíðar rentuinntøkum, og harvið einum betri rakstrarúrsliti. Eginognin hevur í fleiri ár verið óbroytt, og harvið er realvirðið á samlaðu útlánsmøguleikunum minkað í mun til realvirðið við stovnsetanina av Menningargrunni Útnorðurs.

Tað er soleiðis málið hjá nevndini, at eginognin í framtíðini, so vítt møguligt, økist við størri rentuinntøkum sum fylgja av einari skjótari umseting av gjaldførinum til nýggj útlán og møguligar hægri inntøkur í framtíðini. Samstundis skal tað higartil effektiva eftirlitið av afturgjalding av útlánum halda fram, samstundis sum tað framhaldandi skal verða ein neyv kostnaðarstýring.

Nevndin hevur í 2015 samtykt eina nýggja innsatsætlan. Innsatsætlanin kann lesast á heimasíðuni hjá Menningargrunni Útnorðurs, www.vestnorden.is

# ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársroknskapin hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014. Vit meta, at tann valdi roknskaparhátturin er hóskandi og gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarstøðu og úrsliti, umframt peningastreymi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

***Oyvindur av Skarði***
Føroyar - formaður

***Jørn Birk Olsen***
Grønland – næstformaður

***John Bernhard***
Danmark

***Christell Åström***
Finnland

***Ásgerður Kristin Gylfadóttir***
Ísland

***Maria Olofson***
Svøríki

***Tor-Egil Lindeberg***
Noreg

Undirskrivað á nevndarfundi í Stokkhólmi, tann 15. mars 2016:

***Sverri Hansen***
Forstjóri

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING

## *Átekning frá óheftum grannskoðara*

Til leiðslu og eigarar av Menningargrunni Útnorðurs.
Vit hava grannskoðað ársfrágreiðingina hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2015.
Ársfrágreiðingin fevnir um leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreymsfrágreiðing, nýttan roknskaparhátt og viðmerkingar.

## *Ábyrgd leiðslunnar av frágreiðingini*

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum er í samsvari við lóg um ársroknskap í Íslandi. Henda ábyrgdin fevnir um at gera, innføra og viðlíkahalda innanhýsiseftirlit, sum er týdningarmikið fyri, at ársfrágreiðingin verður gjørd soleiðis, at rættvísandi mynd fæst, og er uttan týðandi skeivleikar, og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Ábyrgdin hjá leiðsluni fevnir eisini um at velja og gera nýtslu av rímiligum roknskaparsiði og roknskaparmetingum, sum eftir umstøðunum mugu metast rímiligar.

## *Ábyrgd grannskoðarans*

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu av ársroknskapinum. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi altjóða grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum. Grannskoðanin fevnir um arbeiðið, soleiðis at grannskoðanin fær vissu fyri teimum upphæddum og upplýsingum, sum framganga av ársroknskapinum.

Grannskoðanin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hon um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrágreiðingini, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðanin metir eisini um innanhýsiseftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrágreiðing, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina í innanhýsiseftirlitinum.
Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrágreiðingin sum heild er gjørd.
Tað er okkara fatan, at vit hava fingið eitt nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## *Niðurstøða*

Tað er fatan okkara, at ársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av rakstrinum av Menningargrunni Útnorðurs fyri árið 2014, hansara ognum og skuldum við árslok 2015, peningastreymsfrágreiðingini fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2015, og at ársfrágreiðingin er í samsvari við lóggávuna um ársroknskap í Íslandi.

Reykjavík, tann 15. mars 2015

***Ásbjörn Björnsson***
Løggildur grannskoðari
Ernst & Young - Ísland

***Sveinn Arason***
Ríkisgrannskoðari

# RAKSTRARROKNSKAPUR *1. januar - 31. desember 2015*

| | Viðmerkingar | 2015 DKK | 2014 DKK |
|---|---|---|---|
| *RENTUINNTØKUR* | | | |
| Rentuinntøkur frá bankainnlánum | | 99.786 | 191.447 |
| Rentuinntøkur frá útlánum | 3 | 2.839.142 | 2.803.333 |
| Gjaldoyra og virðisjavni | | (62.077) | (63.202) |
| | | 2.876.851 | 2.931.579 |
| *AÐRAR INNTØKUR* | | | |
| Aðrar inntøkur | | 58.020 | 58.020 |
| | | 58.020 | 58.020 |
| ***Rakstrarinntøkur tilsamans*** | | 2.934.871 | 2.989.599 |
| *RAKSTRARÚTREIÐSLUR* | | | |
| Lønarútreiðslur v.m. | | | |
| til fyrisiting og nevnd | 5 | 1.870.580 | 1.887.281 |
| Útreiðslur til fyrisiting | 3,5 | 900.823 | 1.217.902 |
| Avskrivingar, íbúð | 6 | 51.972 | 51.972 |
| ***Fyrisiting tilsamans*** | | 2.823.375 | 3.157.459 |
| Tap og burturleggingar í árinum | 4 | 578.074 | (279.363) |
| ***Tap og burturleggingar tilsamans*** | | 578.074 | (279.363) |
| ***Rakstrarútreiðslur tilsamans*** | | 3.401.449 | 2.878.096 |
| *AVLOP* | | (466.578) | 111.503 |

# FÍGGJARSTØÐA *tann 31. desember 2015*

| **Ogn** | **Viðmerkingar** | **2015 DKK** | **2014 DKK** |
| --- | --- | --- | --- |
| *GJALDFØRI* | | | |
| Bankainnlán | | 25.524.182 | 34.434.281 |
| **Gjaldføri tilsamans** | | 25.524.182 | 34.434.281 |
| *ÚTLÁN* | | | |
| Útlán | 3 | 93.180.675 | 84.520.244 |
| **Útlán tilsamans** | | 93.180.675 | 84.520.244 |
| *MATERIELL STØÐISOGN* | | | |
| Íbúð | 6 | 2.523.540 | 2.575.512 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | 2.523.540 | 2.575.512 |
| *AÐRAR OGNIR* | | | |
| Skuldarar | | 18.998 | 36.067 |
| **Aðrar ognir tilsamans** | | 18.998 | 36.067 |
| *OGN TILSAMANS* | | 121.247.395 | 121.566.104 |

| **Skyldur** | **Viðmerkingar** | **2015 DKK** | **2014 DKK** |
| --- | --- | --- | --- |
| *ONNUR SKULD* | | | |
| Ognarar | | 256.019 | 108.148 |
| **Onnur skuld tilsamans** | | 256.019 | 108.148 |
| *LÁN* | | | |
| Lán - íbúð | 7 | 567.000 | 567.000 |
| **Lán tilsamans** | | 567.000 | 567.000 |
| *EGINOGN* | 8 | | |
| Stovnspeningur | | 91.284.091 | 91.284.091 |
| Tiltakspeningur, primo | | 29.606.864 | 29.495.362 |
| Flutt frá ársins úrsliti | | (466.578) | 111.503 |
| **Eginogn tilsamans** | | 120.424.377 | 120.890.956 |
| *SKYLDUR TILSAMANS* | | 121.247.395 | 121.566.104 |

## PENINGASTREYMSÚTGREINING *fyri 2015*

| | 2015 DKK | 2014 DKK |
|---|---|---|
| *PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRI* | | |
| Úrslit ársins | (466.578) | 111.503 |
| Postar, íð ikki hava ávirkan | 585.769 | (198.558) |
| **Broytingar frá rakstrarroknskapi** | 119.191 | (87.055) |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ LØGUM* | | |
| Avdráttir frá útlánum | 16.214.026 | 17.494.871 |
| Útgoldin nýggj lán | (25.500.000) | (17.670.000) |
| Skuldarar | (51.179) | (73.034) |
| **Broytingar, løgur** | (9.337.153) | (248.163) |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGING* | | |
| Ognarar | 307.863 | (139.065) |
| NORA | 0 | (60.807) |
| **Broytingar í fígging** | 307.863 | (199.872) |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, løgum og fígging** | (8.910.098) | (535.090) |
| **Gjaldføri primo** | 34.434.281 | 34.969.371 |
| **Gjaldføri ultimo** | 25.524.182 | 34.434.281 |

# VIÐMERKINGAR

## 1. Upplýsingar um Menningargrunn Útnorðurs

Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs er at læna pengar út til fyritøkur í Grønlandi og Føroyum, og undir ávísum umstøðum eisini í Íslandi. Høvuðssætið hjá Menningargrunni Útnorðurs er í Sigtúni 42, 105 Reykjavík, Ísland.

## 2. Nýttur roknskaparháttur

*Roknskaparháttur alment*

Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um ársroknskap í Íslandi. Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum í fjør. Øll roknskapartøl eru í donskum krónum.

*Virðisásetan*

Roknskapurin er gjørdur út frá ávísum fyritreytum, sum eru grundaðar á ávísar metingar. Hesar metingar ger leiðslan í Menningargrunni Útnorðurs í samsvari við nýttan roknskaparhátt, og við støði í søguligum royndum og fyritreytum, og sum leiðslan metir vera álítandi og realistiskar. Søluvirðið kann víkja frá mettum virði.

*Gjaloyra kursjavnan*

Rørslur í útlendskum gjaldoyra verða bókaðar til tann kurs, sum er galdandi tann dagin, rørslan fer fram. Fíggjarlig ogn og skuld í útlendskum gjaldoyra verða virðisásett í roknskapinum við tí kursi, sum er galdandi ultimo í árinum. Kursbroytingar verða bókaðar í rakstrarroknskapinum. Kursurin ultimo 2015 var 0,053 (ISK/DKK), og ultimo 2014 0,048 (ISK/DKK)

*Materiell ogn*

Materiell ogn er tikin við í roknskapinum til útveganarvirðið, frádrigið avskrivingar.

*Útlán*

Útlán eru tikin upp til nominelt virði, og við burturleggingum móti tapi, sum ikki er staðfest. Burturleggingar av útlánum verða gjørdar bæði á hvørt einstakt lán og á bólkar av lánum.

*Burturleggingar av útlánum*

Burturleggingar av útlánum endurspegla tann váða, sum er tengdur at útlánsvirksemi. Talan er ikki um staðfest tap av útlánum. Broytingar í burturleggingum og staðfestum tapum síggjast í rakstrarroknskapinum og viðmerkingunum.

*Gjaldføri*

Gjaldførið í fíggjarstøðuni og peningastreymsútgreiningini fevnir um kassapening og bankainnlán.

*Inntøkur*

Inntøkur, t.v.s rentur av teimum lánum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur goldið út, verða inntøkuførdar, tá ið terminsútskrivingin verður gjørd.

## 3. Útlán

*Útlán greinað á lond*

| | Føroyar | Grønland | Ísland | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Samlað útlán | 41.849.015 | 51.162.823 | 168.837 | 93.180.675 |
| Rentuinntøkur av lánum | 1.350.000 | 1.394.961 | 94.181 | 2.839.142 |

Undir rentuinntøkum stava 255.000 DKK frá lántøkugjøldum. Undir fyrisitingarkostnaði eru bókaðar 83.175 DKK, sum eru útreiðslur til advokatar fyri teirra arbeiði at skriva lániskjøl og fáa tey tinglýst.

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs*

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Hotell og ferðavinna | 43,03% | 36,94% |
| Handverk og smáídnaður | 34,66% | 38,70% |
| Fiskiídnaður | 9,19% | 14,15% |
| Aðrar vinnur | 13,12% | 10,21% |
| | 100% | 100% |

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs greinað eftir restafturgjaldstíð*

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Avdráttir, íð falla innan 1 ár | 12.147.954 | 11.914.352 |
| Avdráttir, íð falla eftir einum ári og innan 5 ár | 35.374.845 | 45.326.879 |
| Avdráttir, íð falla eftir 5 árum | 45.657.876 | 27.279.013 |
| | 93.180.675 | 84.520.244 |

**4. Burturleggingarkonto fyri útlán**

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Burturleggingar primo | 12.868.399 | 14.806.936 |
| Burturlagt í árinum | 578.074 | (279.363) |
| Staðfest tap í árinum | 0 | (1.659.174) |
| Burturlagt ultimo | 13.446.473 | 12.868.399 |
| Burturlagt sum prosent av samlaðum útlánum | 12,62% | 13,21% |

**5. Lønarútreiðslur**

Lønarútreiðslur vóru tilsamans 1.870.501 DKK. Tað var løn til stjóra, starvsfólk og samsýning til nevnd sum er 70.000 DKK. Tað eru 2 heiltíðarstørv í Menningargrunni Útnorðurs. Nevndarsamsýningin er 10.000 DKK árliga fyri hvønn lim og 20.000 DKK til nevndarformannin. Harafturat fáa nevndarlimirnir fundarsamsýning fyri hvønn fund eftir galdandi reglum hjá Norrønu Ráðharranevndini. Eitt limaland hevur fráskrivað sínum nevnarlimi rætt til nevndarsamsýning.
Útreiðslur til grannskoðan vóru 76.373 DKK.

**6. Materiell støðisogn**

| | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði | 2.887.344 | 2.887.344 |
| Avskrivað primo | (311.832) | (259.860) |
| Avskrivað í árinum | (51.972) | (51.972) |
| Bókað virði ultimo | 2.523.540 | 2.575.512 |
| Avskrivingartal | 2% | 2% |

**7. Lán- íbúð**

Afturgjaldingin av lánunum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur tikið, byrjar í 2028, og lánini verða afturgoldin yvir 15 ár. Lánini eru rentufrí fram til 2028, tá ið afturgjaldingin byrjar. Tey rentu- og avdráttarfríu lánini eru veitt av Naalakkersuisut og Kommuneqarfik Sermersooq, við somu upphædd frá hvørjum.

**8. Eginogn**

*Eginognskonto*

| | Stovnspeningur | Tiltakspeningur | Úrslit ársins | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Eginogn primo | 91.284.091 | 29.606.864 | 0 | 120.890.955 |
| Úrslit ársins | 0 | 0 | (466.578) | (466.578) |
| Eginogn ultimo | 91.284.091 | 29.606.864 | 0 | 120.424.377 |